## Byggivinnan missir 100 um dagin



Hvønn dag missa 100 fólk í donsku byggivinnuni arbeiðið, skrivar Nyhedsbrevet 3F. Eftir fjúrtan døgum eru 1.200 fólk í byggivinnuni vorðin arbeiðsleys, soleiðis at nú eru 13.000 fólk í byggivinnuni arbeiðsleys. Tað við siga, at arbeiðsloysið í donsku byggivinnuni er 11,3 prosent samanborið við 4,2 prosent fyri einum ári síðani. Tølini ery frá hálvum februar, og tí eru tey veruligu tølini uppaftur størri, sigur Gunde Odgaard, talsmaður hjá byggivinnuni, við 3F. Tann bólkurin í byggivinnuni, sum er meinast raktur av arbeiðsloysi, eru múrararnir. Av teimum eru 25 prosent arbeiðsleysir.

## Avgjaldshækking gav einki

Ætlanin hjá grønlendska landsstýrinum at fáa 100 milliónir krónur eyka í landskassan í fjør við at hækka avgjøldini á søtmeti, alkoholi og rúsdrekka, gekk ikki eftir ætlan, sigur KNR. Hagtølini hjá skattastýrinum vísa, at tá úrslitið fyri 2008 er gjørt upp, restaðu 74 milliónir krónur í. Tað var í oktober í 2007, at Landstingið samtykti at krevja 100 milliónir krónur eyka inn í avgjøldum fyri at rinda hallið á fíggjarlógini, sum var 100 milliónir krónur. Men sambært KNR bleiv úrslitið, at landskassin fekk 79 milliónir krónur minni í avgjøldum enn ætlað.

# Nógv bygging í Húsavík

**Hóast nógva tosið um kreppu og ringu líkindini at fáa lán, standa tvey hús í gerð í Húsavík – og tvey onnur eru á veg**



*Tvey hús standa í gerð í Húsavík. Byggiloyvi er givið til eitt triðja og ein fjórða umsókn bíðar eftir, at byggiætlanin fyri kommununa er klár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

BYGDAMENNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá tú koyrir gjøgnum Húsavík slepst ikki undan, at tú leggur til merkis tvey sethús, sum standa í gerð.

- Ætlanin er eitt sindur seinkað. Meiningin var at flyta inn í august, men tað verður so ikki fyrr enn nú, sigur Jákup Martin Sørensen, borgarstjóri í Húsavíkar kommunu.

Hann sigur, at fólkatalið sum soleiðis stendur í stað, men tað ger vøksturin av bygdini ikki, tá tað ræður um hús.

- Umframt hesi bæði húsini, sum nú standa í gerð, hava vit latið byggiloyvi til eitt aftrat, og ein umsókn liggur inni, sum vit ikki fáa avgreitt, fyrr enn nýggja bygdaætlanin er klár, sigur Jákup Martin Sørensen.

Og talan er um eina ógvuliga ambitiøsa ætlan, sum umfatar ikki færri enn 20 nýggj grundstykkir.

- Tað hevur verið arbeitt við hesari ætlanini í eina tíð, og vit vóna og rokna við, at hon verður liðug og samtykt áðrenn summarið kemur, sigur borgarstjórin í Húsavíkar kommunu.

Hjá teimum báðum pørunum, sum hava hús í gerð, kemur maðurin úr Húsavík, meðan konan kemur av Sandi, og borgarstjórin sigur, at tær tykjast at trívast ógvuliga væl í Húsavík.

- Høvdu tær ikki gjørt tað, bleiv nokk ikki bygt her. Hinvegin er frástøðan til Sands ikki so stór, bara átta minuttir í bili. Vit hava eisini eitt barn í skúlanum í Skálavík og heili fimm børn í barnagarðinum á Sandi og eitt í Skopun, so avstandurin hevur ikki serliga nógv at siga í hesum døgum, sigur Jákup Martin Sørensen.

### Fólk flyta til

Borgarstjórin sigur, at fólkatalið seinastu árini hevur verið støðugt, og sambært Hagstovuni búðu 77 fólk í Húsavík við árslok í fjør.

Kortini er tað soleiðis, at tey bæði nýggju húsini, sum skulu byggjast í nærmastu framtíð føra tilflytarar til bygdina.

- Í teimum báðum førunum eru tað fólk, sum flyta til, ungfólk við familju, so tað er rættiliga hugaligt í so máta, sigu Jákup Martin Sørensen.

Bygdin er heldur ikki sør fyri arbeiðspláss. Fyrst og fremst er tað Eysturbúgvin, sum hóast skrásettur í Dali er heimahoyrandi í Húsavík. Hartil kemur frisørsalongin hjá Marnu Skylv Sørensen, sum hevur verið í bygdini síðani 1988, og sjálvur hevur Jákup Martin Sørensen eitt byggivirki. So tilsamans eigur bygdin nøkur arbeiðspláss.

- Tað er eingin handil longur í bygdini, men sum nevnt eru avstandirnir so stuttir allastaðni at tað ikki bilar. Men vit hava eitt pláss til húsvognar í bygdini og eitt ungmannafelags hús eisini, so bygdin er heldur ikki sør í so máta, sigur Jákup Martin Sørensen.

Í bygdini eru umleið 30 hús, har fólk búgva í, og tá nú tað koma knappliga fýra nýggj til aftrat, so er tað lutfalsliga nógv.

- So eru eisini fleiri hús, sum í dag standa tóm, og sum avbygdafólk eiga og nýta til summarhús. Men tey verða væl hildin, so tað er ikki so galið, sigur Jákup Martin Sørensen.

Í bygdini er eisini ein skúli, men í løtuni ganga eingi børn í honum.

- Vit hava bara hitt eina barnið í tí aldrinum, og hon gongur í skúla í Skálavík. Um tvey ár skulu so tvey børn byrja í fyrsta flokki, men hvussu tá verður gjørt, veit eg ikki. Tað er upp til foreldrini, men eg kundi hugsa mær, at tað gerst eitt sindur einsligt, bara at verða tvey børn í skúlanum, sugur Jákup Martin Sørensen, borgarstjóri í Húsavíkar kommunu, sum umframt Húsavík eisini telur Dal og Skarvanes.

# Íverksetarahúsið nýggja nevnd

**Hósdagin 5. mars var aðalfundur í Grunninum Íverksetarahúsið hildin í Klaksvík**

TÍÐINDASKRIV

Í nevndina vórðu vald Hilmar Sam Lamhauge, umboð fyri Eik banka, Regin W. Dalsgaard, umboð fyri Vinnumálaráðið, og Kitty May Ellefsen, umboð fyri Klaksvíkar kommunu. Nevndin skipaði seg við Kitty May Ellefsen sum forkvinnu.

Úr nevndini fóru Eyðun Mørkøre og Torben Hendriksen, sum báðir hava sitið í nevndini síðani Íverksetarahúsið byrjaði sítt virksemi í 2007.

Nevnd og stjórn í Íverksetarahúsinum fara framhaldandi at virka fyri, at Føroyar mennist sum ein íverksetaratjóð í fremstu røð. Hornasteinarnir í hesu menning eru góð ráðgeving og effektivar stuðulsskipanir, sum kunnu gera góðar íverksetaraætlanir til eitt aktiv hjá íleggjarum og øðrum samstarvspartnarum at gera íløgur í.

Høvuðsstuðlarnir hjá Íverksetarahúsinum eru enn sum áður Vinnumálaráðið, Eik banki og Klaksvíkar kommuna.



*Komandi og fráfarandi nevndin fyri Íverksetarahúsið saman við stjóranum. Frá vinstru: Rani Nolsøe, Hilmar Sam Lamhauge, Gunnvá við Keldu, Kitty May Ellefsen, Regin Dalsgaard, Eyðun Mørkøre*